Grundarsteinur

# ÍVERKSETAN

## Innihaldsyvirlit

Aðalmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 69
Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 69
Partmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Íverksetanarhugburður . . . . . . . . . . . . . . . . 70
Íverksetanarskipanir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 71
Fíggjarmøguleikar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 72
Skattaviðurskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 75
Lógarkarmar og reglur . . . . . . . . . . . . . . . . . 76
Smidlig fyrisiting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 77

# Aðalmál

Í 2015 sleppur íverksetarin at savna seg um hugskotið og at vinna pening, tí allar forðingar eru beindar av vegnum. Føroyar eru ein íverksetaradepil, sum dregur at sær fólk úr øllum heimi

## Samandráttur

Íverksetarar hava stóran týdning fyri máttin og vøksturin í búskapinum í einum samfelagi. Tað er í nýggjum virkjum og fyritøkum, at nýggj hugskot koma undan kavi og verða roynd. Íverksetarar bjóða verandi virkjum av og økja um kappingina.

Eins og fólk í øðrum Norðurlondum vilja nógvir føroyingar stovna egið virki. Eisini stovna eldri, siðbundnar fyritøkur dótturfeløg fyri at ganga nýggjar leiðir. Tað sæst á føroysku hagtølunum um stovnað partafeløg og smápartafeløg. Í 2005 vórðu stovnað 38 partafeløg og 197 smápartafeløg. Frá 1. januar 2006 til 16. oktober 2006 vórðu stovnað 32 partafeløg og 302 smápartafeløg. Viðmerkjast skal, at harumframt eru stovnað onnur virkir, sum eru annað enn partafeløg og smápartafeløg.

Tað hevur stóran týdning fyri øll virkir at hava góðar arbeiðskarmar. At hava ein sunnan og støðugan búskap, eina vælútbúnað arbeiðsmegi, ein smidligan arbeiðsmarknað og ein vælvirkandi kapitalmarknað, eru neyðugir tættir, fyri at íverksetarar skulu trívast og mennast í samfelagnum.

Grundarsteinurin undir einum samfelagi við nógvum íverksetarum er ein mentan, sum er eyðkend við viljanum og evnunum at hugsa nýtt, og sum vísir vilja og dirvi. Grundarsteinurin undir eini sterkari, sjálvstøðugari mentan skal leggjast í fólkaskúlanum, har næmingar arbeiða skipað við hugskotsmenning í øllum lærugreinum. Í miðnámsskúlunum skulu næmingarnir hava tilboð um undirvísing í íverksetan og nýskapan.

Betri atgongd til váðafúsan kapital og nýggj fíggingarambоð skulu geva íverksetarum betri møguleika at fáa kapital til hugskot síni. Skattalætti til íverksetarar skal elva til størri vøkstur og fleiri íløgur. Ein íløgukonta skal gera tað lættari hjá íverksetarum at spara saman til egið virki.

Almennu byrðurnar skulu gerast einfaldari við nýggjum, talgildum loysnum og miðvísari ráðgeving. Tað skal verða einfalt at byrja av nýggjum eftir húsagang. Vinnulóggáva og aðrar lóggávur, sum hava týdning fyri umstøðurnar hjá íverksetarum, verða dagførdar sambært altjóða leisti.



## Partmál

Orðað eru partmál um:

- Íverksetanarhugburð
- Íverksetanarskipanir
- Fíggjarmøguleikar
- Skattaviðurskifti
- Lógarkarmar og reglur
- Smidliga fyrisiting



## Íverksetanarhugburður

Føroyar skulu mennast til at vera eitt áhugavert stað hjá virkisfúsum fólki at byrja nýggja vinnu. Eitt fjøltáttað útbúgvingarverk skal vera ein virkin partur í at ala fram ein íverksetarahugburð í samfelagnum. Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlitini til at vinna pening vera góð

### Soleiðis røkka vit málinum

Hugburður fólksins um íverksetan og íverksetarar ávirkar hug tess at ganga hesa leið. Í summum londum verða fólk frá barnsbeini eggjað til at gerast íverksetarar, og lagt verður í tey, at íverksetarar eru slóðbrótarar og fyrimyndir.

Skulu vit ala fram ein betri íverksetarahugburð, er ein eyðsýndur møguleiki at byrja í skúlaverkinum.

### Fólkaskúlin

Í fólkaskúlanum skulu næmingar læra at arbeiða skipað við nýskapan í øllum lærugreinum. Frálæran í ymsu tímunum skal broytast, soleiðis at hon hevur námsfrøðiligar hættir og teknikkir, sum stimbra og menna nýskapanarkunnleikan hjá fólkaskúlanæminginum.

Í fólkaskúlanum skal dentur verða lagdur á íverksetan við verkætlanum, evnisdøgum og íverksetaraspølum ella við kappingum.

Lærarar skulu í sambandi við útbúgving og eftirútbúgving fáa frálæru í háttum, sum stimbra nýskapanarkunnleikan hjá næminginum.

Skapast skal eitt sterkt alment-privat samband, eitt sokallað netverk millum fólkaskúlan og vinnulívið. Mentamálaráðið, Vinnuhúsið og SamVit skulu gera leistin fyri, hvussu netverkið skal skipast og nýtast.

### Miðnámsskúlin og aðrar viðkomandi útbúgvingar

Praktiskur kunnleiki til at umseta hugskot til vinnuveg økir um møguleikarnar fyri, at tann einstaki byrjar egið virki. Frálæra í íverksetan gagnar eisini teimum ungu, sum ikki stovna egna fyritøku, men velja at arbeiða á eini verandi fyritøku.

Tí skulu allir miðnámsskúlanæmingar hava tilboð um frálæru í íverksetan. Mentamálaráðið skal arbeiða fyri, at lærarar á miðnámsskúlunum fáa neyðugu eftirútbúgvingina. Í broytingum í lógum og kunngerðum skal standa, at miðnámsskúlin er við til at menna íverksetanarkunnleikan hjá næminginum.

Vinnumálaráðið skal virka fyri, at SamVit, ið millum annað skal birta upp undir íverksetan, skipar fyri einum árligum íverksetaraskeiði. Her skulu íverksetarar við samlátisdømum (simuleraðum dømum) royna seg við at stovna og reka egna fyritøku. Luttøka verður fíggjað við stuðli og egnum gjaldi.

SamVit, Vinnuhúsið, miðnámsskúlar og hægri lærustovnar so sum Vinnuháskúlin eiga at stovna netverk, ið skulu bjóða næmingum og lesandi útbúgvingartilboð í íverksetan. Umframt hetta skal SamVit saman við Mentamálaráðnum virka fyri, at neyðug eftirútbúgvingartilboð eru til lærarar, sum undirvísa í áðurnevndu skúlum.

Næmingar og lesandi skulu arbeiða við verkætlanum, har tey royna seg sum íverksetarar í verki, ella arbeiða við skrivligum uppgávum, sum snúgva seg um íverksetan. Eitt dømi um hetta er European Business Game, sum miðnámsskúlarnir í Føroyum eru við í. Onnur dømi eru Ungt virki, sum Føroya handilsskúli hevur staðið fyri í nógv ár, og samlátisspøl (simulatiónsspøl), sum miðnámsskúlarnir hava roynt.

### Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg

Annað umráðandi mál er, at hægri lærustovnar og granskingarstovnar eru tilvitaðir um, at vitan kann handilsgerast.

Harumframt eigur at verða eggjað til, at fólk við hægri útbúgving skapa sær sín egna vinnuveg ella oftari søkja sær starv í vinnuni.

Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlit vera fyri at vinna pening. Vit skulu líta á orðatakið: »Tá ið tað regnar á prestin, so dryppar á deknin.« Við øðrum orðum, tá ið íverksetarar okkara hava góðan gróðrarbotn og kunnu grundleggja stórar fyritøkur, so gongst eisini betur í samfelagnum sum heild.

## Íverksetanarskipanir

Virksemið við ráðgeving og íverksetanarnetverkum skal styrkjast og íverksetanarráðgeving savnast á einum stað. Íverksetaranetverk skulu viðurkennast, mennast og knýtast saman við øðrum altjóða netverkum

### Soleiðis røkka vit málinum

Ein spurningur, sum ofta verður viðgjørdur bæði uttanlands og heima, er, í hvønn mun tað almenna skal seta á stovn serligar skipanir fyri íverksetarar, og hvørjar tær skulu vera. Serliga hevur kjakast verið um tann partin, sum hevur við fíggjarligar skipanir at gera. Fyrimunurin við slíkum skipanum er, at peningaliga veikir íverksetarar fáa høvi at menna síni hugskot, men vansin er so, at tær eisini kunnu vera kappingaravlagandi og stuðla ódugnaskapi.

Fíggjartørvurin hjá íverksetarum eigur at verða nøktaður við váðafúsum sáðkapitalskipanum. Sí brotið um fíggingarmøguleikar.

Uppgávan hjá tí almenna er sostatt serliga at lætta um møguleikarnar hjá íverksetarum at fáa atgongd til vitan, kapital og samstarvsfelagar, og at tryggja, at tað ikki verður ov tvørligt hjá íverksetarum at fara undir virksemi sítt.

### Íverksetararáðgeving savnast og netverk stovnsetast

Ein av høvuðslutunum hjá SamVit verður at birta upp undir nýskapan og íverksetan og at samstarva við aðrar myndugleikar um at samskipa fyrisitingarmannagongdir, sum hava týdning fyri íverksetarar.

Sostatt skal øll ráðgeving, sum íverksetarum tørvar til at stovna egið virki, fáast til vega frá SamVit. Ráðgeving um framtíðar virkisvøkstur skal eisini vera til taks har.

Í Havn og aðrastaðni skulu setast á stovn íverksetarahús, sum saman við SamVit skulu ráðgeva íverksetarum. Fyri ein rímiligan penga skulu íverksetarar kunna leiga seg inn í hesi hús, har teir skulu fáa ráðgeving og eitt skapandi umhvørvi, so at teir betur kunna umseta hugskot síni til veruleika.



Saman við SamVit skulu íverksetarahúsini bera so í bandi, at íverksetaranetverk verða stovnað, har íverksetarar læra hvør av øðrum og skapa nýggj hugskot saman. Stovnast skal eisini ein mentorskipan, har íverksetarar kunnu fáa gagn av royndum hjá vinnulívsfólki.

Íverksetaranetverk skulu røkka út um landoddarnar, so at íverksetarar okkara fáa samband við netverk í øðrum londum við.

Íverksetarahúsini skulu arbeiða saman við SamVit, Vinnuhúsinum og vinnuligu skúlunum í Føroyum. Íverksetarahúsini verða fíggjað við gjaldi frá leigarum og eini fastari upphædd á fíggjarlógini.

## Fíggjarmøguleikar

Gjøgnumskygd atgongd til menningarfígging, sum setur krøv til íverksetaran, eins og stuðulsskipanir til serstøk menningar- og marknaðarátøk skulu styrkjast. Váðafús- og sáðkapitalmarknaðurin skulu vera við til at fremja føroysk íverksetarahugskot

### Soleiðis røkka vit málinum

Royndir vísa, at tess størri kapitalgrundarlagið undir tí nýstovnaða virkinum er, tess størri er møguleikin fyri, at virkið mennist skjótt. Sparringin og førleikin, ið virkið fær frá einum ella fleiri íleggjarum, ið hava royndir við virkisrakstri, hava ein týðandi leiklut fyri vakstrarmøguleikarnar hjá nýggjari fyritøku.

Ein fortreyt fyri íverksetaravirksemi er atgongdin til fígging. Skulu góð hugskot verða til nakað, krevst fígging til at fullføra tey. Almenna uppgávan er at gera rúm fyri eini samanhangandi fíggingarskipan, har atgongd er til ódýra granskingar-, sáð-, váðafús- og peningastovnsfígging, umframt fígging gjøgnum virðisbrævamarknað.

Ofta eru ymsir partar uppií at fíggja vørumenning, men stundum kann ein og sami peningastovnur fíggja alt arbeiðið. Tað hevur størsta týdning at hava fleiri fíggingarmøguleikar, antin tað snýr seg um kveiking, íverksetan ella menning, tí eru teir ov fáir, er skjótt, at fíggingartørvurin hjá íverksetaranum verður ikki nøktaður. Royndir vísa, at peningastovnar ofta eru varnir við at fíggja nýtt og ókent virksemi, ella har long tíð gongur, frá tí at íverksetarin hevur tørv á fígging, til virksemið kann fara at geva yvirskot.

### Tolin og váðafúsur kapitalur

Váðafúsur kapitalur hevur ein serligan leiklut í sambandi við íverksetaravirksemi. Hetta er serliga galdandi fyri íverksetarar í tøknifrøði, har mangan er torført at fáa pening til vegar við vanligum bankaláni. Atgongdin til váðafúsa og tolna fígging er tí ofta avgerandi fyri, at íverksetarar sleppa at menna síni hugskot.


BUSINESS
PLAN

Økjast skal um útboðið av privatum váðafúsum kapitali, eins og virkast skal fyri, at uppaftur meiri eftirlønarpeningur verður settur í at menna føroyskt vinnulív. Í samstarvi við privatar og aðrar íleggjarar skulu verandi grunnar menna nýggjar hættir at útvega váðafúsan kapital og hjálpa til at fíggja t.d. menning av vørum og marknaðum hjá tí skapandi umhvørvinum. Saman við íleggjarum, ið hava royndir í virkisrakstri, skulu grunnarnir við marknaðarlíkum treytum raðfesta íløgur í nýggj og vakstraráhugað virki. Somuleiðis eigur atgongdin til váðafús lán at gerast lættari.



### Váðafús lán til at menna nýggj virki

Verandi grunnar skulu oftari veita váðafús lán til vakstrarsinnaðar íverksetarar. Í londunum kring okkum hevur riggað sera væl hjá vakstrargrunnum og privatum íleggjarum í felag at menna lán, ið hava sum treyt, at úrslit sæst aftur hjá lánarunum, og at møguleiki er at fremja leiðsluarbeiðið á virkinum. Endamálið er at fáa tær bestu royndirnar frá váðafúsu íløgunum til lánsfíggingina, t.e. at knýta lán og virkismenning saman.

### Karmar hjá sáð- og váðafúsum íleggjarum

Sáð- og váðafúsir íleggjarar fara ofta sjálvir við í tær verkætlanir, sum teir læna pening til, og tí hava teir mangan betri grundarlag at meta um vandar og møguleikar enn aðrir kapitalveitarar. Ein váðafúsur íleggjari hevur ofta hollan kunnleika til fyriskipan, strategi og marknaðarføring, og hesin kunnleiki er nógv verdur fyri ein íverksetara.

Landsstýrið kann ávirka útboðið av váðafúsum kapitali, fyrst og fremst við at tryggja rímiligar karmar, sum stuðla upp undir vælvirkandi fíggjarmarknaðir. Harafturat kann Landsstýrið tryggja, at t.d. skattareglur og fyrisitingarligar byrður ikki eru so tungar, at nýggjar fyritøkur hokna undir byrðuni.

Ásannast má, at útboðið av fíggingarmøguleikum í Føroyum hevur ikki verið nøktandi. Seinastu tíðina er gongd tó komin á váðafúsa kapitalmarknaðin, og fleiri privat íleggingarfeløg eru stovnað seinastu árini. Framtaksgrunnurin samstarvar við hesi feløg um verkætlanir, har váðin er stórur, og/ella tá ið kapitaltørvurin er ov stórur hjá einum íleggjara at nøkta.

Strategibólkurin sær tað sum eina gongda leið, at fleiri íleggjarar við royndum frá virkisrakstri gera íløgur í nýtt virksemi. Íverksetarar hava ofta góð hugskot, men lítlan og ongan eginpening, og tí er umráðandi, at íleggingarfeløgini samstarva og gerast fleiri.

### Vinnuframi

Landsstýrið vil virka fyri at stuðla fyritøkum at byggja upp m.a. framleiðslu av nýggjum vørum og tænastum, menning av hávirðisvørum og hávirðistænastum og aðra framleiðslu við stórum nývirði. Eitt vinnuligt nýlendi, sum eigur at stuðlast, eru skapandi vinnurnar. Sum dømi kunnu nevnast tónleikur og handverkslist. Stuðul til slík øki verður veittur við eini vinnuframaskipan, sum m.a. stuðlar menningini av nýggjum vørum og tænastum, telduforritum, kt-loysnum og skapandi vinnum, nýskapandi verkætlanum, sølufremjandi tiltøkum og ferðavinnu.

Vinnuframagrunnurin stuðlar í dag m.a. skapandi vinnum og menning av hávirðisvørum og hávirðistænastum. Tí er umráðandi at styrkja hesa skipan við størri játtan.

## Skattlig viðurskifti

Skattaskipanin skal vera lokkandi fyri íverksetarar og skattligu karmarnir lagaligari, eitt nú virðisbrævaoptiónir til starvsfólk

### Soleiðis røkka vit málinum

Skattaskipanin hevur nógv at siga fyri áhugan at seta pening í nýggjar fyritøkur, serliga har váðin er stórur.

Skattareglurnar eru mangan til ampa hjá íverksetarum, ið vilja vaksa skjótt um virksemi sítt. Tí skulu íverksetarar, ið stremba eftir skjótum vøkstri, fáa skattalætta, sum gevur teimum møguleikar til tess. Somuleiðis skal íverksetarum standa í boði ein íverksetarauppsparingarkonta til egið virki.

### Skattalætti

Samgongan eigur at betra um møguleikarnar hjá íverksetarum til skjótan vøkstur og øktar íløgur við at veita skattalætta. Íverksetarar skulu fáa 100.000 kr. árliga í skattafrádrátti fyrstu trý árini, ið fyritøkan hevur eitt gott, skattskyldugt úrslit.

Skal frádrátturin gagna sum mest, skal skattskyldan hjá virkinum vera minst 100.000 kr.

### Uppsparingarkonta við frádrátti

Samgongan eigur at gera eina nýggja uppsparingarkontu til íverksetarar, har innskotið kann dragast frá í skattinum. Endamálið er at økja um áhugan hjá íverksetarum at spara saman til egið virki.

Uppspardi peningurin kann nýtast til rakstrarútreiðslur sum t.d. lønir, men eisini til at keypa kt-útbúnað, vørur og annað, sum krevst til at stovna egið virki.

### Virðisbrævaoptiónir

Nýggjum fyritøkum tørvar ofta neyðugu leiðsluna og marknaðarføringina til at skunda undir vøkstur av nýstovnaðu fyritøkuni. Karmar skulu tí skapast fyri, at íverksetarar kunnu løna lyklapersónum við partabrøvum. Endamálið við hesum er, at tað skal gerast lættari at fáa fólk til nýstovnað virki.

Lønar íverksetarin lyklapersónum við partabrøvum trý tey fyrstu árini, skal hetta ongar skattligar avleiðingar fáa, tá ið partabrøvini verða handað. Í staðin verða tey skattað sum partabrævainntøka, tá ið tey verða seld. Tað fer at gera tað lættari hjá nýstovnaðum virkjum at seta lyklapersónar í leiðslu, marknaðarføring og sølu.

## Lógarkarmar og reglur

Umsitingarligu reglurnar skulu vera léttar og greiðar at virka undir, og minkast skal um føroyskar serreglur. Vinnulóggávan og reglur annars skulu gerast lagaligari fyri smærri virkir og fylgja altjóða reglum

### Soleiðis røkka vit málinum

### Lagaligari vinnulóggáva fyri íverksetarar

Fyri at lætta um byrðurnar hjá íverksetarum skulu skyldurnar í vinnulóggávuni mótvegis íverksetarum gerast lagaligari.





Smá virkir og íverksetarar skulu sleppa undan grannskoðanarskyldu. Í samljóði við vinnupolitikkin er í nýggja uppskotinum til ársroknskaparlóg lagt upp til, at fyritøkur, sum lúka tvær av niðanfyri nevndu ásetingum:

- Javni 0-1,5 mió. kr.
- Søla 0-3 mió. kr.
- Starvsfólk 0-12

hava ikki skyldu at grannskoða ársroknskap sín. Hetta er tó ikki galdandi fyri móðurfeløg.

Sambært Skráseting Føroya eru nógv feløg, sum koma undir hesa reglu. Omanfyri nevndu mørk galda longu í fleiri ES-londum.

Skráseting Føroya hevur eftirlit við, at lógarkrøvini til grannskoðaðar og ógrannskoðaðar roknskapir verða fylgd við at velja út og eftirkanna eitt ávíst tal á roknskapum.

Alt tilfar, sum virkir hava skyldu til at útvega almennu myndugleikunum, kann latast inn um alnetið. Her verður serliga hugsað um myndugleikar, sum virkir ofta hava samskifti við, t.d. Skráseting Føroya og Toll- og Skattstovu Føroya.

### Vinnulóggávan skal fylgja altjóða reglum

Tað hevur stóran týdning fyri virkir, sum kappast á altjóða marknaðinum, at karmarnir í ymsu londunum eru so eins, sum til ber.

Ársroknskaparlógin skal tí broytast, so at heimild fæst fyri, at føroysk feløg kunnu gera ársroknskap eftir altjóða reglum. Feløg, ið eru skrásett á virðisbrævamarknaði í Íslandi ella Norðurlondum annars, skulu gera ársroknskap eftir altjóða IFRS-reglunum. Altjóða reglurnar á hesum øki eiga at verða settar í gildi í Føroyum, so at føroysk virkir, sum eru skrásett á virðisbrævamarknaðinum, bert skulu gera ein ársroknskap.

Partafelagslógin og smápartafelagslógin eiga at fylgja altjóða leistinum. Tí verður millum annað mælt til at strika bústaðarkravið um, at partur av nevnd og stjórn skal hava bústaðarskyldu í Føroyum, um partafelag skal stovnast her.

## Smidlig fyrisiting

Lættast skal um fyrisitingarligu byrðurnar hjá íverksetarum. Tænastur, sum hava týdning fyri íverksetaran, skulu savnast á einum stað. Alnetið skal lætta um byrðurnar hjá íverksetarum og trotabúsviðgerðin skal vera skjótari. Samskipað marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum uttanlands skal styrkjast

### Soleiðis røkka vit málinum

Eins og tað er umráðandi at skapa karmar við at gera lógir, kunngerðir og skipanir, sum hava týdning fyri vinnuliga umhvørvið, líka so umráðandi er tað hjá landsins stovnum at umsita hesar fyriskipanir væl og smidliga, og at sum mest fæst burtur úr teimum játtanum, sum verða latnar hesum stovnum.

Harumframt hevur tað størsta týdning, at stovnarnir eru væl samskipaðir, soleiðis at fyritøkurnar fáa somu boð, sama hvønn stovn tær venda sær til. Tí eigur miðvíst arbeiði at verða sett í verk, so at fyritøkur – har ber tað til – bert skulu venda sær til ein myndugleika at greiða síni viðurskifti. Ein miðvís talgilding av almennu fyrisitingini og samstarv millum viðkomandi myndugleikar fer at hjálpa í so máta.

### Ráðgeving savnast á einum stað

SamVit skal skapa eitt framsøkið umhvørvi, soleiðis at bæði tað almenna og vinnulívið, sum stovnurin er ætlaður at menna, kunnu fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum teir hava at arbeiða við.

SamVit fer at hava eitt fjøltáttað samstarv við nógvar partar so sum vinnusamskipanir, einstakar fyritøkur, íverksetarar, ymsu stjórnarráðini og stovnar teirra. Nakrar av fremstu uppgávum stovnsins vera at marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur, marknaðarføra Føroyar sum íløguland, menna ferðavinnuna í Føroyum og marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland.

Stórur partur av virkseminum hjá SamVit verður at ráðgeva íverksetarum, soleiðis at hesir kunnu venda sær til stovnin og fáa neyðuga ráðgeving til at lúka tey krøv, sum almennir myndugleikar seta. Játtanin til stovnin skal vera nøktandi fyri at fremja hesa ætlan í verki.

### Alnetið skal lætta um byrðurnar hjá íverksetarum

Tær fyrisitingarligu byrðurnar hjá íverksetarum eru tungar, og íverksetarar halda, at fyrisitingin er tung og tvørlig.

Málið hjá samgonguni er, at fyrisitingarligu byrðurnar hjá íverksetarum skulu gerast upp til 40% lættari. Hetta gerst innan 2015 við at gera tað lættari at skráseta virkir, tey skulu bert upplýsa á einum og sama stað, og talgild málsviðgerð skal vera á teimum almennu støðunum, sum íverksetarar venda sær til.

### Lættari at skráseta nýggj virki

Tá ið íverksetarin stovnar egið virki, skal hann bert skráseta seg á einum stað. Tað almenna syrgir síðani fyri, at upplýsingarnar verða latnar rætta myndugleikanum.

### Lættari skattaumsiting

Allar fyritøkur skulu hava einans skattakontu ella skatta- og MVG avrokning. Kontan skal nýta somu grundreglu um fíggjarstøðu sum ein vanlig bankakonta. Hetta

merkir, at upphæddin, sum virkið hevur til góðar, til dømis hall á MVG, verður mótroknað í upphæddini, sum virkið skal gjalda.

MVG-avrokning skal latast inn til Toll og Skatt eina ferð um árið hjá virkjum, sum hava ein umsetning, ið er minni enn 500.000 kr. árliga.

### Trotabúgv skjótari avgreidd

Danskar kanningar vísa, at íverksetarar, sum byrja um aftur eftir húsagang, hava hepnari hond enn teir, sum royna seg á fyrsta sinni. Tí skal ikki vera óneyðuga trupult hjá álítandi íverksetarum at byrja av nýggjum.

Við verandi skipan er ov drúgt at viðgera trotabúgv, og henda viðgerðartíðin eigur at verða stytt.

### Samskipa marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum uttanlands

Føroyar mugu gera meira við at marknaðarføra seg, so at útlendskir íleggjarar fáa hug at gera íløgur í føroyska vinnu í samstarvi við áhugaðar partar her á landi, til dømis íverksetarar.

SamVit skal taka sær av at marknaðarføra Føroyar miðvíst uttanlands. Marknaðarføring av føroyskum vørum og tænastum verður at halda fram í samstarvi við viðkomandi partar. Talan skal bæði vera um heildarmarknaðarføring gjøgnum virknastu miðlarnar og um úrvalsmarknaðarføring, ið vendir sær beinleiðis til íleggjararnar.

Hesi vóru í strategibólkinum fyri íverksetan:

Kitty May Ellefsen, fulltrúi, Vinnumálaráðið, forkvinna
Gissur Patursson, stjóri, nevndarlimur í Vinnuframagrunninum
Gloria Kalsø, handilsskúlalærari, nevndarforkvinna í Framtak
Oddbjørg Højgaard, íverksetari, Team85
Regin W. Dalsgaard, íverksetari, Isuus Mobile
Hans Andreas Joensen, stjóri, P/F Thor
Maria Róin, deildarstjóri, Vinnumálaráðið, var forkvinna til september 2006
Áki Johansen, deildarleiðari, Menningarstovan, í bólkinum til september 2006